# Svimjihøllin í Gundadali nýggjar startskamlar

**STARTSKAMLAR Á býráðsfundinum hjá Tórshavnar kommunu hóskvøldið kemur eitt mál til viðgerðar um at keypa nýggjar start-skamlar til Svimjihøllina í Gundadali.**

– Í Svimjihøllini í Gundadali er tørvur á nýggjum nútíðarhóskandi start-skamlum. Í hesum sambandi eru tilboð komin frá LM og Nomatek. Tilboðið frá LM fevnir um skamlarnar við allari tekniskari útgerð. Tilboðið frá Nomatek fevnir um arbeiði í sambandi við uppsetingina, m.a. stálarbeiði. Harumframt verður lagt upp fyri óvæntaðum kostnaði við 10%, og her verður serliga hugsað um møguligt múraraarbeiði, verður sagt í viðmerkingunum til uppskotið.

Kostnaðurin verður tilsamans 603.750,00 krónur. Á fíggjarætlanini 2011 eru avsettar 350.000,00 krónur á framfluttum íløgum.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fíggja arbeiðið við kr. 350.000,00 av tí peningi, sum er avsettur á íløgum, og kr. 253.750,00 av íløgum, sum eru avsettar til felagshølini hjá Havnar Svimjifelag. Tilsamans kr. 603.750,00.

Mentamálanevndin hevur samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur somuleiðis samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta 350.000 krónur av íløguætlanini fyri 2011 og 163.000 krónur av íløgum, sum eru avsettar til felagshølini hjá Havnar Svimjifelag – tilsamans 513.000 krónur.

Tilboð frá LM 388.650
+ mvg 25% 97.163
Tilboð frá Nomatek 50.441
+ mvg 25% 12.610
548.864
Óvæntað 10% 54.886
Íløga tils. kr. 603.750





*Tórshavnar kommuna eigur nógva jørð eitt nú í Havnardali, og nú skal leigan setast hálva millión upp*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Dýrari at leiga traðir í Havn

**TRAÐARLEIGA Á býráðsfundinum hóskvøldið fer býráðið at viðgera eitt uppskot um at hækka leigugjaldið av traðum og urtagarðsstykkjum munandi.**

Leo Poulsen

Tað hevur higartil verið rættiliga bíligt at leiga traðir frá Tórshavnar kommunu. Higartil hevur tað kosta umleið 10 oyru fermeturin í meðal at leiga traðir og um 25 oyru fermeturin fyri urtagarðsstykkir.

Tær umleið 100 traðirnar liggja millum 2.000 og 20.000 fermetrar, men felags fyri tær er, at prísurin er eins fyri allar. Árliga leigugjaldið er 1.000 krónur um árið.

Tær umleið 100 traðirnar hava eitt samlað øki á beint omanfyri eina millión fermetrar, og við einum fermetraprísi á 50 oyru verða leiguinntøkurnar beint oman fyri hálva millión. Inntøkurnar frá traðarleigu eru í dag umleið 100.000 krónur.

Urtagarðsstykkini eru 43 í tali og eru til víddar millum 666 og 1.059 fermetrar. Eisini her hevur leiguprísurin verið eins, 200 krónur fyri stykkið.

Samlaða urtagarðsøkið er 36.000 fermetrar og rað gevur 18.000 krónur í inntøkum móti verandi inntøku á 8.600 krónur

Nýggja leiguásetingin fer at geva kommununi eina inntøku á 520.911 krónur móti 106.600 í dag.

Broytingin merkir, at leigugjaldið skal gjaldast eftir, hvussu stórar traðirnar eru. Meðalprísurin fyri leigugjaldið hevur verið 10 oyru fermeturin, men nú verður mælt til, at prísurin verður ásettur til 25 oyru fermeturin frá 1. august 2012, og síðani upp á 50 oyru fermeturin frá 2015.

## Minka bíðilistan

Hetta fer at merkja eina meirinntøku til kommununa á umleiðhálva millión. Hetta stavar frá hækkaðum leigugjaldi og hækkaðum tilsýnsgjaldi. Ásett verður eitt sýnsgjald fyri urtagarðsstykki á 300 krónur, 700 krónur fyri traðir upp til 10.000 fermetrar og 1.000 fyri traðir oman fyri 10.000 fermetrar.

Kommunan hevur ein sýnsmann, sum hevur árligt eftirlit ella sýn við traðum og urtagarðsstykkjum. Í umsitingini verður sagt, at sýnsmaðurin kannar eftir, at innhegningin er í lagi, og at traðin í heila tikið verður røkt.

Umsitingin væntar, at ein avleiðing av hækkaða prísinum verður, at fleiri av leigarunum við stórum traðum fara at ynskja at fáa minni øki. Miðað verður eftir, at fáa traðir á umleið 4.000 fermetrar, og tá ber til hjá leigarum við traðum á 8.000 fermetrar at býta trøðna sundur í helvt.

Hetta merkir so aftur, at fólk, sum í dag standa á bíðilista at fáa eina trø, sleppa framat. Á tann hátt ber samstundis til at minka um bíðilistan.

Umsitingin hevur arbeitt við málinum í eina tíð, og væntandi verður málið samtykt á býráðsfundinum hóskvøldið.